**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara
Vit eru til reiðar!
**Telefon 11820 · Telefax 14720**

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
**Telefon 11820 · Telefax 14720**

# veðrið

Hátrýst verður yvir Eysturskandinaviu næstu dagarnar og rættuliga lítt luftrák verður sunnaneftir móti Føroyum.

__Hósdagin__



Hvassur vindur upp í skrið, 15–20 m/s, av suðri, ádrigið, tám, ælingur ella regn í skiftum og bert toluligt ella vanaligt sýni. Hitin millum 8 og 12 stig.

__Fríggjadagin__
Strukur í vindi upp í skrið, 13–28 m/s, av suðri og landsynningi, ádrigið, bert hendinga æl og toluligt ella gott sýni. Hitin millum 7 og 10 stig.

__Leygardagin, sunnudagin og mánadagin__
Vindur lagt, einamest friskur vindur av suðri, stundum millum struk í vindi og skrið, 13–18 m/s, ádrigið og regn í skiftum, men annars toluligt ella gott sýni. Hitin millum 7 og 10 stig.

## óli teknar

© 1993 Sosialurin / Óli Petersen

*Samvinna*



**Bretar bjóða okkum at samstarva í oljuvinnuni, samstundis sum teir krevja stóran part av føroyska landgrunninum**

## Lesarabrøv

# Útlendskir stjórar í Norðurlandahúsinum

Nú fáa vit aftur ein nýggjan stjóra í Norðurlandahúsinum. Tann fyrsti var dani, tann næsti íslendingur, triði svii, fjórði norðmaður og nú fáa vit ein finskan. Alt gott um hetta at siga, eg eri greiður ivir, at stjórarnir í Norðurlandahúsinum ikki kunnu vera føroyingar.

Men skuldi tað ikki verið eitt krav, at teir kundu gjørt seg skiljligar á føroyskum máli. Teir hava jú eina átrúðliga ávirkan á føroyskt mentunnarlív.

Eg trúgvi, at tað hevði verið ringt hjá einum føroyingi at fingið starv sum stjóri í Norðurlandahúsinum á Álandi, dugdi hann ikki at gera seg skiljligan á svenskum, ella í Reykjavík, dugdi hann ikki eitt sindur av íslendskum. Kanska vit eiga at bera yvir við finnum, tí teirra móðurmál liggur so fjart frá føroyskum, men teir kunnu royna.

Lat hetta vera eitt krav til komandi stjórarnar í Norðurlandahúsinum, at teir duga somikið á føroyskum at meinigi maðurin skilir hvat teir siga.

**Jógvan Heinesen**







## Trúboðin: Sjómansheinini eru í truplum tíðum nú

Í gjár kom Trúboðin út, og hesaferð hevur hann sett kikaran á tey bæði sjómansheimini, ið føroyska sjómansmissiónin hevur ábyrgdina av og rekur – Tórshavnar Sjómansheim og Runavíkar Sjómansheim.

Tað er sambært Trúboðanum eingin lætt uppgáva at reka sjómansheimini í dag, og er størsta orsøkin til tað, at virksemið er so nógv minkað.

Innihaldið í blaðnum hesaferð er mest greinar við andaligum innihaldi, umframt okkurt tíðindakent, sum eitt nú at norska skaldið Trygve Bjerkrheim er heiðrað fyri sítt virksemið. Frá hansara hond eru komnir ikki færri enn 14.000 sangir og sálmar.

**hj.**

## Vestfalskyrrindi

**12. november: Mánin næstur jørðini**
**13. november: Tendring**
**21. november: Fyrra kvarter**

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp. | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. nov. | 1002 | 2227 | – | 1202 | 0817 | 2042 | 1017 | 2242 | 0902 | 2127 | 0917 | 2142 |
| 19. nov. | 1050 | 2314 | 0027 | 1250 | 0905 | 2129 | 1105 | 2329 | 0950 | 2214 | 1005 | 2229 |